# Eurokursurin er nú fallin til eitt lægri støði

BÚSKAPUR
*Rolf Guttesen*
*rg@geogr.ku.dk*



Dollarin styrknar framvegis í mun til Euro. Á nýggjárinum var europeiska valutan í hæddini og tá fekst 1,36 USdollari fyri fyri euruna. Seinasta mánadag helt euru-fallið fram og lutfallið var tá gott 1,28 $ fyri eina . Hetta er lægsti kursur á euro í einar tríggjar mánaðar.

Nógvar gitingar eru í teim stóru europeisku bløðunum um ørsøkina til hetta fall. Eygleiðarar eru samdir um, at tað mest er stutttíðar spekulatión, og fallið ikki kann grundast í teim búskaparligu tølunum, sum mynda støðuna í USA og Europa. .(NZZonline-070205) Her hugsa teir um handilsjavnar, statshúsarhaldið, arbeiðsloysisprocent, búskaparligan vøkstur og rentuna. Út fra hesum kundi man vænta, at dollar fall enn meir, tí bæði hallið á statshúsarhaldinum í USA og á handilsjavnanum har er óvanliga stórt. Men í Europa eru eisini trupulleikar, høgt arbeiðsloysi og lágur búskaparvøkstur.

### Europa fyrimun av lækkandi Euro

Gongdin í lutfallinum millum dollar og euro, hevur tann fyrimun fyri Europa og harvið eisini donsku krónuna, sum er føst bundin at euro, at tað verður lættari at flyta út vørur. Hetta hevur merktst um Europa, har partabrævahandilin er lívligari. Amerikanska hagstovan kunngjørdi fríggjamorgunin tølini, sum vístu nýkomin arbeiðspláss í januar. Menn høvdu væntað eitt tal, sum lá umleið 200.000, men tað vísti seg bert at blíva 146.000. Hetta fekk eina negativa ávirkan á dollaran, men sama dag komu meldingar frá amerikanskum bankamanni, sum beinanvegin vendi gongdini.

### Alan Greenspan á fundi í London

Hetta hendi á fundi í seinastu viku í London, har vinnulívsfólk og politikarar hittust. Amerikanski tjóðbankastjórin Alan Greenspan boðaði frá, at marknaðarkreftir saman við "a tighter US fiscal policy" (ein strammari fíggjarpolitikk) skuldu klára problemini. Bush ætlar ikki at broyta politikkin stórvegis á teim økjum, sum annars hava ført til hall og fallandi dollar.

### Kinesisk revaluering

Annars var eitt annað stórmál á skránni í London. Tað var kinesiska valutaeindin Yuan, sum nógvir amerikanarar halda vera ov lágt setta. Ein lágur kinesiskur yuan ger, at teir hava lætt við at selja vørur til USA, og teir royna tí at pressa kinesarar til at revaluera ella uppskriva virðið á yuan, so hallið á handlinum kann minka. Yuan er bundin at dollar, á sama hátt sum danska krónan er bundin at euro. (Tað japansk yen ikki, sum Kaupthing sigur í seinasta "Útliti").Tí hevur USA ikki havt nakran fyrimun handilsliga viðvíkjandi Kina, nú dollarin var fallandi í virði. Tí yuan fall akkurát líka nógv. Kinesarar royna sum best at avnokta, at teir hugsa um aðra skipan, enn tann sum er galdandi. "Ikki fyribils", og nær verður tað so?




NÝTT NÝTT NÝTT




TEKNA TEG SUM HALDARA **NÚ.**
**450,-** UM ÁRSFJÓRÐINGIN
SPARIÐ **395,-** Í MUN TIL LEYSASØLU

950,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(650,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO

Sosialurin 341800

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________
Bústaður: ____________
Postnr.: ____________
Bygd/býur: ____________
Telefon nr.: ____________
Undirskrift: ____________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn